# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Tórálv Stenberg

**f. 25. august 1954 – d. 10. november 2006**

Tað er við stórari samkenslu, at eg skal seta meg niður og festa minningarorð á blað um vinin og formannin í Argja Bóltfelag, Tórálv Stenberg, sum bleiv tikin frá okkum eftir stutta sjúkralegu, bert 52 ára gamal.

Argja Bóltfelag og føroyskur fótbóltur hava mist eina sanna eldsál. AB ímyndin farin, tíverri verður Tórálvur ikki partur av AB ferðalagnum, sum komandi ár ferðast kring landið, at vitja tey bestu. Soleiðis skrivað ítróttarfeløg kring landið um Tórálv, og tað er so satt sum tað er sagt.

Eg kom at kenna Tórálv, tá hann bleiv venjari hjá tí eldra soninum hjá mær, sum tá bert var 8 ára gamal.

Vit sum fylgdu við, bæði til venjing og dystir sóu skjótt, at Tórálv brendi fyri, at venja dreingirnar og var somuleiðis sera góður við teir, og teir við hann. Tað var mangan áðrenn dyst, at hann bjóðaði teimum heim til sín, til ein bita, ja, Tórálv visti hvat skuldi gerast fyri at fáa gott úrslit.

Úrslit gav tað eisini, í 1999 blivu dreingirnir føroyameistarar í smápiltadeildini, ið var fyrsta meistaraheitið í mannfólkafótbólti hjá AB, og seinni vunnu teir bæði silvur og bronsu, eitt megnar arbeiði av Tórálvi. Tórálvur vandi dreingirnar líka til tann dag, hann fall fyri sjúku.

Í 2000 tók Tórálvur við sum formaður í AB, og vit sum stóðu AB nær, sóu skjótt at hesin maðurin vildi nakað, sum nógv aldri høvdu droymt um, og tað var at fáa AB upp í fremstu deild í føroyskum fótbólti.

Tórálvur visti væl, at skuldi kósin setast fyri at náa málið, skuldi sjálvandi eisini nógvur peningur til. Hann vildi hava eitt Stuðlafelag sett á stovn, fyri at fáa pening til vega.

Hann kom heim til mín, og spurdi um eg kundi hjálpa honum við at



koma í nevndina í Stuðlafelagnum. Eg vildi ikki siga nei, tí eg visti at hesin maðurin brendi fyri AB, so eg segði við hann, at sjálvandi vil eg hjálpa til nú eg eisini havi børn í AB.

Tann 28. februar 2001 var Stuðlafelagið stovnað, og eg gloymi ikki hvussu glaður Tórálvur tá var, nú hevði hann nátt tað fyrsta málið.

Eg gjørdist formaður í Stuðlafelagnum, og nú komu vit báðir at hava nógv við hvønn annan at gera.

AB var tá í 2. deild, so tað var langt á mál. Nevdin í AB og Stuðlafelagnum tóku arbeiði í størsta álvara, og við Tórálvi á odda var gongd sett á arbeiði. Tí vit vistu, at tað ið Tórálvur hevði sett sær sum mál, vildi hann eisini náa.

Tað var ofta ein tungur róður at rógva og ofta breyt í bæði borð, men Tórálvur góði, tú gavst ikki, tað var ikki altíð stuttligt hjá tær at verða formaður í AB.

Vit høvdu vónað, at tað ikki skuldi takað so nógv ár at náa málið, men í ár, 7 ár eftir at tú setti kósina, bleiv málið sum tú strembaði eftir nátt.

Tórálv var ein rørdur og stoltur formaður, tá ið tað var staðfest at AB hevði nátt ovastu rók í føroyskum fótbólti og tað vórðu vit øll samd um, at tað hevði hesin stríðsmaður so hjartaliga uppiborið.

Tað eru nógv góð minnir ið renna fram fyri meg, sum vit hava havt saman í AB.

Tórálvur skipaði fyri trimum túrum til fótbóltskappingar í Danmark við dreinginum ið hann vandi, og har sluppu vit sum foreldur við. Hetta vóru ógloymandi túrar, ið vit sum foreldur og dreingir aldri koma at gloyma.

Tórálvur plagdi at siga við meg, hvat skuldi eg gjørt um eg ikki hevði eina konu sum Haldis, sum stuðlar mær so væl í øllum. Ja, góða Haldis, Tórálvur fekk allan tann stuðul frá tær, sum tú kundi geva honum.

Tórálvur takk fyri allar tær ógoymandi løtur og góð minnir í AB, takk fyri allar tær góðu og hugnaligu løtir í heiminum hjá tær og Haldis.

Tórálvur, trúgvur vart tú, tað var neyvan dagur, at tú og eg ikki tosaðu við hvønn annan. Røddin er tagnað, vit standa spyrjandi, men fáa einki svar.

Góða Haldis, Fróði, Jónas og Heðin, tit hava mist ein góðan mann og pápa.

Vit drýpa høvur í stóru sorg yvir Tórálv Stenberg, tú verður aldri gloymdur, men í minninum goymdur. Má Harrin styrkja tykkum, sum eftir sita.

Hervið lýsið eg frið yvir vinin og stríðsmannin Tórálvur Stenberg.

Hvíl í friði góði frændi.

**Andrass Drangastein**

## Til minnis um Tórálvur Stenberg

**ættaður úr Saltnesi búsitandi á Argjum**



*Dagin fyri Mortansmessu*
*fór tú heim til himnahøll*
*har vit hittast aftur øll*

*Mong spor tú eigur inni í Vikan*
*uppi í hamri millum klettarnar*
*situr hugtungur fuglur, hví kúrur tú*
*tí sonur av Saltnesi*
*er ikki millum okkum meir*

*Lívið er eins og blóman á markini*
*prýðir haga og bø og hvørvur*

*Røddin »Kom so AB« nú er tagnað*
*Felagið títt hjartabarn var*
*Tína eldsál - vit aldrin gloyma.*

*Hvíl í frí góði Tórálvur*
*Guðs einglavakt verði hjá tær*
*ærað veri minni títt.*

**Steinbjørn Viggosson Olsen**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Josefina Maria Højgaard**
*Toftir*

doyði og varð jarðað.
Eina serstaka tøkk til Martin Restorff Jacobsen, prest, fyri góð orð til jarðarferðina.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar og til tykkum, sum hjálptu til í ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Føroya felag móti krabbameini og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Familjunnar vegna**
*Eskild*
*Jóan Petur, Herdis, Dan, Henning og Djóni*

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Johannes Jacobsen, Oyrabakki,** fer av Røktarheiminum á Mørkini í dag kl. 17.00. Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju mikudagin kl. 13.00.

**Jallgrím Hentze av Sandi** andaðist á Landssjúkrahúsinum í dag, 94 ára gamal.

**Maria Arge Myklebust úr Havn, vanliga nevnd Systi hjá Bil-Óla, búsitandi í Myklebust á Harøy pr. Ålesund,** andaðist sunnudagin 75 ára gomul

i
Sosialurin

**Dagurin í morgin**

**22. november. Cecilia,** deyð umleið ár 225. Rómversk genta, sum frá barnsbeini hevði verið kristin. Foreldur hennara góvu hana í hjúnalag við heidnan ungan mann, Valerianus, men sjálva brúðarnáttina umvendi hon hann. Varð tikin av døgum í Róm sum pínsluváttur. Rómverskt ættarnavn, ið merkir tann blinda.

*Nikolai Mohr føddur hendan dagin í 1742.*